SKJÓTISAMBAND FØROYA

# Ársroknskapur 2021

V-tal 474207
V-tal (serskilt) 632899

skot@skot.fo
http://skot.fo

31-03-2022

menta
skrásettir grannskoðarar

**LEIÐSLUÁTEKNING**

Nevndin, ið hevur ábyrgdina av ársfrásøgnini, hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2021 hjá Skjótisambandi Føroya.

Ársfrásøgnin er sett upp samsvarandi lógum felagsins og tillagað ásetingunum í galdandi føroyskum roknskaparleiðbeiningum.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi, soleiðis at ársfrásøgnin gevur eina rætta mynd av ognum og skyldum, fíggjarligu støðuni, rakstrarúrslitinum og peningastreyminum.

Ársfrásøgnin fyri tíðarskeiðið 1. januar til 31. desember 2021 verður hervið løgd fyri ársaðalfundin til góðkenningar.

Tórshavn, tann 6. apríl 2022

| | | |
|---|---|---|
| Esmar Joensen<br>formaður | Marius F. Joensen<br>nevndarlimur | Jógvan Egholm<br>nevndarlimur |
| Finn Ludvig<br>nevndarlimur | Jónstein Johannesen<br>nevndarlimur | |

menta
skrásettir grannskoðarar

## Átekning frá óheftum grannskoðara

***Til nevndina í Skjótisambandi Føroya***

### Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2021 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskapartíðarskeiðnum frá 1. januar til 31. desember 2021 samsvarandi niðanfyristandandi roknskaparreglum.

### Hvat vit hava grannskoðað

Ársrsroknskapin hjá Skjótisambandi Føroya fyri roknskaparárið 2021 við rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu, saman við nýttum roknskaparhátti felagsins. Undir einum nevnt "Ársfrásøgnin".

### Grundarlag fyri niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardum fyri grannskoðan og øðrum ásetingum í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisku krøvunum fyri grannskoðarar (etisku reglunum hjá IESBA) og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Føroyum, og hava hildið okkara etisku skyldur, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Tað er okkara fatan at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Ábyrgd nevndinar av ársroknskapinum

Nevndin hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglum. Nevndin hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið nevndin metir skal til fyri, at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur nevndin ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftirroknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at nevndin hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella, at nevndin í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

### Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um hesir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um tað eru sannlíkindi fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki ar varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Gera niðurstøðu um, hvørt tað er hóskandi, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum er fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskiftini í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingarávísingarnar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Meta um samlaðu framløguna framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, herundir upplýsingarnar í notunum, umframt um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at tað gevur eina rættvísandi mynd av hesum.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi eygleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit eyðmerkja undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 6. apríl 2022

**MENA Sp/f**
skrásett grannskoðanarvirki

Alvi S. S. Nielsen
skrás. grannskoðari

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**
Ársfrásøgnin er gjørd samsvarandi niðanfyri standandi roknskaparreglum. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá í fjør.

**Alment um innrokning og virðisáseting**
Inntøkur verða rakstrarførdar, so hvørt sum tær verða vunnar. Sama er við virðisbroytingum á fíggjarligum ognum og skyldum. Kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum verður rakstrarførdur við møguligum av- og niðurskrivingum, svarandi til roknskaparárið.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at framtíðar fíggjarligir fyrimunir fara at koma felagnum tilgóðar og virðið á ognunum kann metast álítandi. Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá tað er sannlíkt, at fíggjarligir fyrimunir koma felagnum tilgóðar og at skyldurnar kunnu mátast álítandi. Ogn og skyldur verða fyrstu ferð tiknar við til útveganarvirði og eftir tað verður hvør roknskaparpostur viðgjørdur, sum gjøllari lýst niðanfyri.

Tá ið ogn og skyldur verða innroknaðar og máldar, verður lagt upp fyri væntaðum tapi og váða, ið vísir seg, áðrenn ársfrásøgnin er liðug, og sum avsanna ella sanna viðurskifti, ið komu til greinar við roknskaparárslok.

Roknskaparliga virðið á og materiellu støðisognunum verður gjøgnumgingið árliga, fyri at gera av, um ábendingar eru um virðisminking, út um vanligu avskrivingina. Um so er, verður støðisognin niðurskrivað til tað lægra av afturinnvinningarvirðinum.

### Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**
Inntøkur er allur stuðul og aðrar inntøkur í árinum.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður er lønir, samsýningar, frítíðarlønir, eftirlønir og almenn lønargjøld.

**Fíggjarpostar**
Fíggjarligar inntøkur og kostnaður, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verða rakstrarførd svarandi til rakstrarárið. Fíggjarpostar eru rentuinntøkur og rentukostnaður.

### Fíggjarstøða

**Áogn**
Áogn verður tikin við til amortiserað útveganarvirði, ið vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti og niðurskriving ímóti tapi.

**Peningur**
Peningur er tøkur kassa- og innlánspeningur.

**Fremmand skuld**
Øll stuttfreistað skuld er tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virði roknskapardagin.

**Veð- og eventualskyldur**
Veð- og eventualskyldur verða upplýstar og avsettar eftir neyðugum tørvi aftast í ársfrásøgnini.

menta
skrásettir grannskoðarar

**Rakstrarrokniskapur fyri tíðina 1. januar til 31. desember 2021**

| K.nr. | | Nota | 2021 kr. | 2020 kr. |
|---|---|---|---|---|
| | **Inntøkur** | | | |
| 1030 | Stuðul frá Ítróttavedding (býti) | | 491.074 | 500.876 |
| 1034 | Sponsor avtalur og stuðlar | | 0 | 0 |
| 1035 | Limagjald limafeløg í SkF | | 12.000 | 12.000 |
| | | | **503.074** | **512.876** |
| | **Inntøkur lands- / FM-kappingin og egingjøld** | | | |
| 1040 | Luttøkugjøld kappingar í Føroyum | | 77.000 | 53.450 |
| 1045 | Luttøkugjøld venjingarlega | | 0 | 0 |
| 1271 | Egingjøld kapping uttanlands | 1 | 55.000 | 45.000 |
| | | | **132.000** | **98.450** |
| | **Lønir** | | | |
| 2030 | Lønir til fyrisiting, samskipan og miðling | | 33.809 | 14.112 |
| | | | **33.809** | **14.112** |
| | **Útreiðslur til venjing og rekrutering** | | | |
| 2915 | Venjingarlega | | 0 | 0 |
| 3003 | Dúgvuískoyti til venjing | 2 | 76.400 | 63.920 |
| 3303 | Rekrutering | | 25.875 | 11.550 |
| 2940 | Kappingar / venjingar uttanlanda | | 125.000 | 90.000 |
| | | | **227.275** | **165.470** |
| | **Útreiðslur landslið (úrvalsíðkarar)** | | | |
| 3041 | Venjingarlega | | 0 | 0 |
| 3050 | Luttøka (ferðing, uppihald og kostur v.m.) | | 0 | 0 |
| 3043 | Útreiðslur til úttøku | | 0 | 0 |
| 3070 | Búnar, prent, reklamur, v.m. | | 0 | 0 |
| 3090 | Annað | | 763 | 0 |
| 3045 | Ískoyti til venjing | | 0 | 0 |
| | | | **763** | **0** |
| | **Lands-/FM kappignar** | | | |
| 3520 | Vallarleiga v.m. | | 64.000 | 45.000 |
| 3525 | Lóður og dúgvur | 3 | 89.085 | 68.058 |
| 3535 | Føroya Cup vinningar | | 17.500 | 17.500 |
| 3536 | Grand Prix vinningar | | 17.500 | 17.500 |
| 3537 | Makkarakapping vinningar | | 5.400 | 0 |
| 3545 | FM vinningar | | 12.000 | 12.000 |
| 3550 | Prentlutir (billettir og skráir oa) | | 3.002 | 4.698 |
| 3555 | FM vinningar unglingar | | 11.000 | 0 |
| 3565 | FM heiðursmerki og ferðasteyp | | 2.278 | 3.621 |
| 3570 | Búnar (skjótivestar og t-shirts) | | -1.050 | 0 |
| 3580 | Annað | | 14.438 | 2.658 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 3585 Viðlíkahald av kastimaskinum | | 45.900 | 36.150 |
| 3590 Framleiðsla av filmun í samband við FM | | 10.359 | 50.000 |
| 3595 Heiðursmerki, steyp, kostur og umhvørvisendurgjald | | 30.600 | 24.100 |
| 3596 Føroyaleikir | 4 | 28.488 | 0 |
| | | **350.500** | **281.285** |
| **Útreiðslur til skeið** | | | |
| 3710 Kostnaður fyri skeiðshaldara | | 0 | 0 |
| 3711 Rekrutering av nýggjum skjúttum | | 0 | 0 |
| 3730 Tilfar til skeið | | 0 | 275 |
| | | **0** | **275** |
| **Felagskostnaður** | | | |
| 4015 Útreiðslur til altjóða fundir | | 0 | 90 |
| 4130 Fundarútreiðslur (aðalfundur v.m.) | | 2.201 | 1.941 |
| 4140 Umboðan | | 2.230 | 2.561 |
| 4170 Starvsnevndarfundir | | 1.973 | 395 |
| 4210 Tryggingar | | 3.216 | -3.828 |
| 4230 Heimasíða - lýsingar | | 2.097 | 6.962 |
| 4430 Tól, teldur o.a. | | 110 | 18.368 |
| | | **11.827** | **26.489** |
| **Fyrisitingarútreiðslur** | | | |
| 4470 Grannskoðan | | 12.344 | 11.969 |
| 4490 Bankakostnaður | | 3.102 | 3.027 |
| | | **15.445** | **14.996** |
| **Úrslit** | | **-4.545** | **108.699** |

menta
skrásettir grannskoðarar

## Fíggjarstøða pr. 31. desember 2021

| | Nota | 2021<br>kr. | 2020<br>kr. |
|---|---|---|---|
| **Ogn** | | | |
| Skuldarar | | 269.000 | 0 |
| Betri Banki | | 277.919 | 557.701 |
| **Ogn tilsamans** | | **546.919** | **557.701** |
| | | | |
| **Skuld** | | | |
| Eginogn: | | | |
| Saldo primo | | 261.861 | 153.162 |
| Ársúrslit | | -4.545 | 108.699 |
| **Eginpeningur ultimo 2020** | | **257.316** | **261.861** |
| | | | |
| **Ognarar** | | | |
| Ikki útgoldnir vinningar FM | 5 | 10.000 | 20.250 |
| Ikki útgoldnir vinningar Føroya Cup | 5 | 14.000 | 11.750 |
| Ikki útgoldnir vinningar Grand Prix | 5 | 15.250 | 13.750 |
| Ikki útgoldnir vinningar Makkarakappingin | 5 | 5.000 | 0 |
| Venjingarlega | | 81.353 | 86.090 |
| Venjara til Føroyar | | 24.000 | 24.000 |
| Nordic Shooting Region | | 120.000 | 120.000 |
| Rekrutering | | 20.000 | 20.000 |
| Aðrir ognarar | | 0 | 0 |
| **Skuld tilsamans** | | **289.603** | **295.840** |
| | | | |
| **Skuld og eginpeningur tilsamans** | | **546.919** | **557.701** |